# Semja millum

# Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya

# og

# Fíggjarmálaráðið

**Sáttmálaskeið**
Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober í 2011 til 1. oktober í 2015.

**Lønarhækkanir**
Tann 1. oktober í 2011 hækka mánaðarlønir 32.000 kr. og undir við 220 kr. Mánaðarlønir 50.000 kr. og yvir hækka ikki. Linjurætt fall harímillum.
Tann 1. oktober í 2012 hækka mánaðarlønir 32.000 kr. og undir við 220 kr. Mánaðarlønir 50.000 kr. og yvir hækka ikki. Linjurætt fall harímillum.
Tann 1. oktober 2013 hækka mánaðarlønirnar 190 kr. + 0,9%
Tann 1. oktober 2014 hækka mánaðarlønirnar 1,9%

**Broytingar í sáttmálatekstinum**
§ 25 verður orðað soleiðis: Um so er, at ein arbeiðsgevari metir, at eitt starv hevur eina tílíka serstøðu, at tað ikki er umfatað av teimum vanligu fortreytunum fyri ásettu lønina, tekur arbeiðsgevarin málið upp við sítt aðalráð, sum sendir umsóknina víðari til Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum. Umsóknin um eina serflokking, viðbót ella onnur viðurskifti verða síðan viðgjørd av Fíggjarmálaráðnum og BLF.

**§ 25 a verður soljóðandi: Tíðaravmarkað viðbót**
Arbeiðsgevarin kann geva eina uppgávurelateraða, tíðaravmarkaða viðbót, tá ið støðan á arbeiðsplássinum er serlig og nakað eyka verður kravt av starvsfólkunum. Viðbótin skal minst verða 2.000 kr. og hægst 4.000 kr. um mánaðin, og tíðarskeiðið, ein kann fáa viðbót, skal hægst vera 9 mánaðir hvørja ferð. Arbeiðsgevarin skal kunna BLF og Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum, tá ið viðbót verður latin. Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum kann steðga viðbótini, tá ið mett verður, at hon er ikki røtt at geva. Í tí føri verður viðbótin steðgað við rímiligari freist, og verður BLF kunnað í hvørjum einstøkum føri.

Partarnir eru samdir um, at serfrøðingakvotan hevur givið ikki tilætlaðar trupulleikar. Í sáttmála-skeiðnum fara partarnir at taka upp hesi viðurskifti, og miðað verður eftir at finna eina nøktandi loysn áðrenn sáttmálaskeiðið er úti.

**Nýggj skipan fyri deildarleiðarar**
Verandi skipan er soleiðis, at talan er um tvey sløg av deildarleiðarum, Deildarleiðari I og Deildarleiðari II, óheft av, hvørt viðkomandi hevur útbúgving sum kandidatur ella bachelor. Framyvir, t.e. frá 1. desember 2012 at rokna, verður hetta skipað soleiðis, at ein flokking verður fyri bachelorar, og ein fyri kandidatar.

Deildarleiðari, hvørs hægsta útbúgvin er á bachelorstigi, verður flokkaður sum Deildarleiðari I. Lønin til deildarleiðara I verður ásett til 34.685,50 kr (pr. 1.12.2012).

Deildarleiðari, hvørs hægsta útbúgvin er á kandidatstigi, verður flokkaður sum Deildarleiðari II. Lønin til deildarleiðara II verður tann sama sum fyri verandi Deildarleiðara II.

Bachelorar, sum í dag eru deildarleiðarar, varðveita sína verandi løn framyvir. Gerast hesir kandidatar í sáttmálaskeiðinum, verða hesir flokkaðir sum deildarleiðarar II.

Sáttmálin og lønartalvurnar verða dagførdar eftir omanfyristandandi.

Á Argjum tann 21. november í 2012

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya — Fíggjarmálaráðið